B36-Sumba 10-0 (4-0):

# Ovurhonds munur

**Munurin millum oddin í bestu deildini og so aðru deild varð týðiliga undirstrikaðu ,tá B36 á heimavølli spákaði sær til stórsigur móti Sumba**

LØGMANSSTEYPIÐ
*Jákup Mørk*



*B36 var mest sum fast innbúgv í brotsteiginum hjá Sumba, tá munurin millum fyrstu og aðru deild varð undirstrikaður leygardagin*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

B36 kundi leygardagin styrkja enn meira um støðu sína í bólki 1, tá Sumba kom á vitjan. Sumba varð undan bólkaspælinum mett sum klárt veikasta liðið í bólkinum, og tað skuldi eisini vísa seg leygardagin, at teir als ikki hava møguleika at standa seg móti liðum, sum verða roknaði upp í oddin í bestu deildini.

### Royndu at halda

Fyrstu løtuna royndu sumbingar kanska at gera nakað av mótstøðu, og tó at Jens Kristian Hansen rættiliga tíðliga stútaði heimaliðið framum, eftir at Jákup á Borg hevði sent fríspark innfyri, so royndu gestirnir at binda fyri.

Hetta helt sær í hálvan tíma ella so. So fall alt saman hjá Sumba. B36 hevði tá í longum løtum verið mest sum fast innbúgv í brotsteignum hjá Sumba, og hetta gav úrslit, tá Fróði Clementsen fekk taklað seg til ein málmøguleika, soleiðis at bólturin at enda varð sendur í meskarnar.

### Gjørdist einvegis

Ferðslan í dystinum heði fram til tá verið rættiliga einstáttað, men nú gjørdist hon fullkomuliga einvegis. Sumbingarnir megnaðu snøgt sagt ikki at spæla bóltin niðaneftir, og ístaðin varð bara lossað burtur. So langt sum yvir høvur gjørligt. Endamálið var kanska at avmarka tapið, men úrslitið var bara, at mest sum hvør sending hjá Sumba fall til B36, sum so aftur kundi herja á.

Herja á, er kanska dekan ov nógv sagt, tí veruleikin er, at meistararnir tóku sær væl og virðiliga av løttum. Helst dugdu teir ikki at síggja nakra orsøk til at spenna bogan alt ov høgt, tí at fáa kort ella skaðar í slíkum dystum, mundi ikki fara at loysa seg fyri teirra viðkomandi.

Eftir 4-0 í hálvleikinum tóktist tað, sum um B36 í seinna hálvleiki nú veruliga ætlaði at halda málveitslu. Tá tímin var runnin, vóru málini sjey í tali, men so fór ferðin enn meira niður, og ivaleyst mundu sumbingarnir fegnast um hetta, soleiðis at teir sluppu undan eini enn størri eyðmýking.

Sum so kundi hvørki av liðunum nýta dystin til so øgiliga nógv annað enn at staðfesta, at munurin millum deildirnar framhaldandi er stórur, og at tað er lítið, sum bendir á, at hann er í ferð við at minka. B36 kundi sjálvandi fegnast um stigini, men hinvegin er mest sum víst, at eisini NSÍ og VB fáa fulla úrtøku úr dystunum móti Sumba, so tað er fyrst og fremst í hinum dystunum, at oddasessurin í bólkinum skal tryggjast.

### Dysturin í tølum

**B36-Sumba 10-0 (4-0)**
1-0: Jens Kristian Hansen
2-0: Fróði Clementsen
3-0: Din Sandu
4-0: John Petersen
5-0: Jens Kristian Hansen
6-0: Fróði Clementsen
7-0: Bárður Mortansson
8-0: John Petersen
9-0: John Petersen
10-0: Jens Kristian Hansen

NSÍ — VB 4-1 (1-0):

# Sannførandi sigur til NSÍ

**NSÍ lat ongan iva verða um úrslitið tá VB var og vitjaði í Runavík leygardagin. Sigurin var ongantíð í vanda, og kundi væl verði størri.**

LØGMANSSTEYPIÐ
*Bjartur Nolsøe*

Undan dystinum lá NSÍ ikki serliga væl fyri í bólkinum. Teir høvdu bert fingið eitt stig í tveimum dystum, og tí var tað mestsum eitt krav at teir fingu trý stig. VB hinvegin hevði fingið seks stig í 3 dystum, og kundi liva við javnleiki.

### Trýstu nógv

Tað sást eisini týðuliga, at tað var NSÍ sum hevði meiri at spæla fyri. Teir løgdu trýst á VB frá byrjan og bólturin lá tað fyrsta korterið fyri tað mesta inni á VB hálvini. Serliga hevði høgra síða hjá VB trupulleikar við Jónstein Petersen og Sjúrður Jacobsen, sum ofta komu ígjøgnum. VB royndi seg við kontra og við nógvum longum bóltum, uttan at teir tó blivu vandamiklir.

Hóast NSÍ trýsti, so varð tað VB sum fekk tann fyrsta opna málmøguleikan. Miðskeiðis í fyrra hálvleiki missir NSÍ bóltin á miðjum vølli, og tað endar við at Mortan í Hørg sleppur leysur ígjøgnum, men beint sum hann skal skjóta kemur verjan ímillum og fær sparka bóltin burtur.

VB kom eftir hetta meiri inn í dystin og fingu meiri spæl. Teir royndu nú meiri at spæla bóltin í staðin fyri at sparka langar bóltar fram til áleypararnar. Teir fingu eisini onkrar góðar royndir móti málinum hesa løtuna.

Tá so umleið hálvur tími er spældur kemur einasta málið í fyrra hálvleiki. Bólturin verður spældur út í vinstru síðu har Helgi L. Petersen sleppur leysur og spælir Sonna L. Petersen púra leysan inni í brotsteiginum.

NSÍ kundi komi uppá 2-0 beint áðrenn hálvleiksteðgin tá Sonni í tveimum førum slapp at skjóta ótarnaður, men Bjarni Johansen í VB-málinum bjargaði báðu ferðirnar frálíka væl.

### Dovnaði eftir avgerðina

Seinni hálvleikur varð bert 2 minuttir gamal tá NSÍ økti til 2-0. Jónstein Petersen verður spældur fríur, rennur frá VB-verjuni og skýtur bóltin framvið Bjarna Johansen. VB kundi minka um munin løtu seinni, tá Palli Augustinussen kom at standa fríur eftir horna. Men Jónstein Petersen bjargaði á mállinjuni.

Tá 12 minuttir vóru spældir av seinna hálvleiki verður dysturin í veruleikanum avgjørdur. NSÍ fær horna í vinstru og har sleppur Óli Hansen at seta høvdið á og so varð 3-0 til heimaliðið.

Eftir hetta varð tað sum um at ferðin fór av dystinum, og bæði liðini høvdu meira ella minni sligið seg til tols við at dysturin var avgjørdur.



*Runavíkingar vunnu týdningarmiklan sigur í bólkaspælinum, tá teir á heimavølli mest sum blástu VB av vøllinum*

Stutt eftir fekk VB ein stóran málmøguleika tá Palli sendi bóltin innfyri úr høgru, men Jens Martin bjargaði royndini frá Birgir Jørgensen, sum varð skiftur inn beint áðrenn steðgin.

Miðskeiðis í seinna hálvleiki bleiv tað 4-0 tá Óli Hansen enn einaferð kundi seta høvdið á bóltin eftir horna. Nú roknaði flestu við at tað fór at skrædna í VB-verjuni, men hóast NSÍ helt fram við at spæla málsøki spæl, fingu teir ikki fleiri mál.

VB fekk minka um munin tá Robert Cieslewicz gjørdist einsamallur í NSÍ-brotsteiginum, og skoraði framvið Jens Martin.

NSÍ vann sostatt 4-1 og varð tað fult uppiborið. Teir høvdu bóltin mest, høvdu flestu málmøguleikarnar meðan VB royndi seg við einari verjukendari uppstilling har teir lúrdu uppá kontra við nógvum longum bóltum.

Hjá NSÍ spældu Jónstein Petersen, Helgi L. Petersen og Pól Thorsteinson ein góðan dyst, meðan Jón Pauli Olsen og Eyðun Jacobsen royndist væl hjá VB.

NSÍ kom við sigrinum uppá 4 stig  og eru teir við aftur í kappingini um at koma víðari til fjórðingsfinalurnar.

# Javnt á Mølini



*Tað eydnaðist hvørji TB ella EB/Streymi at avgera dystin á Mølini leygardagin, og við javnleikinum eru trý lið nú jøvn í bólki tvey.*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Trý lið eru púra jøvn í bólki tvey, eftir at EB/Streymur og TB býttu stigini sínamillum á Mølini á Eiði**

LØGMANSSTEYPIÐ
*Jákup Mørk*

EB/Streymur hevði leygardagin vitjan av TB í einum dysti, sum lættliga kundi gerast avgerandi fyri, hvør teirra skuldi fáa loyvi at fylgja GÍ í fjórðingsfinaluna. Undan dystinum var støðan nevnliga hin sama hjá báðum liðunum, eftir at tey høvdu vunnið ein, tapt ein og spælt ein dyst javnan.

### Á eini leið

Tað var EB/Streymur, sum byrjaði dystin betri, og heilt tíðliga í dystinum komu teir á odda, tá Hans Pauli Samuelsen var seinasti maður á einum álopi.

Hetta var eisini fult í tráð við spælbýtið fram til tá, men spakuliga byrjaði TB nú at koma fyri seg. Roynt varð at trýsta spælið niðan móti málinum hjá heimaliðnum, og um miðjan hálvleikin gav hetta úrslit, tá Alexander Rodasavljevic javnaði, og tá Zoran Mancic síðani kundi økja um leiðsluna, hildu gestirnir væl standa til.  Kanska hildu teir eisini standin vera í so góðan, tí beint undan steðginum eydnaðist Ronnie Samuelsen at javna.

Í seinna hálvleiki royndu liðni bæði hvør í sínum lagi at avgera dystin, men hetta eydnaðist hvørgun av pørtunum, og alt í alt mundi javnleikurin vera eitt rættvíst úrslit.

### Dysturin í tølum

**EB/Streymur-TB 2-2 (2-2)**
1-0: Ronnie Samuelsen
1-1: Alexander Radosavljevic
1-2: Zoran MAncic
2-2: Ronnie Samuelsen

## Bólkaspælið í kappingini um løgmanssteypið

| Bólkur 1 | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 B36 | 4 | 3 | - | 1 | - | 0 | 16 | 2 | 14 | 10 |
| 2 VB | 4 | 2 | - | 0 | - | 2 | 8 | 8 | 0 | 6 |
| 3 NSÍ | 3 | 1 | - | 1 | - | 1 | 6 | 4 | 2 | 4 |
| 4 Sumba | 3 | 0 | - | 0 | - | 3 | 1 | 17 | -16 | 0 |

| Bólkur 2 | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 GÍ | 4 | 3 | - | 1 | - | 0 | 8 | 2 | 6 | 10 |
| 2 EB/Str. | 4 | 1 | - | 1 | - | 2 | 6 | 7 | -1 | 4 |
| 3 FSV | 4 | 1 | - | 1 | - | 2 | 4 | 6 | -2 | 4 |
| 4 TB | 4 | 1 | - | 1 | - | 2 | 5 | 8 | -3 | 4 |

| Bólkur 3 | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 HB | 4 | 3 | - | 1 | - | 0 | 11 | 5 | 6 | 10 |
| 2 Skála | 4 | 2 | - | 0 | - | 2 | 6 | 8 | -2 | 6 |
| 3 KÍ | 4 | 1 | - | 1 | - | 2 | 9 | 9 | 0 | 4 |
| 4 B68 | 4 | 1 | - | 0 | - | 3 | 6 | 10 | -4 | 3 |


# Hvar er bólturin?




Tað er ikki loyvt at kopiera henda lepe

Navn:
Bústaður:
Tlf:
Eg giti, at bólturin er í teigi:

Seðilin skal sendast til:
Sosialurin, postsmoga 76, 110 Tórshavn.
Merkið brævbjálvan "FCK"

**Gitið, hvar bólturin er, og vinnið eina ferð til stórdystin millum FCK og Brøndby**

12. mai í ár verður stórdystur í Danmark. FCK tekur tá ímóti Brøndby, og longu nú er líkt til, at hetta verður dysturin, sum ger av, hvar DM-gullið skal fara í ár.
Sum kunnugt skipa Atlantic Airways og Sosialurin fyri ferð til Keypmannahavnar í samband við dystin, og nú ber til hjá onkrum hepnum lesara at vinna sær pláss á hesi ferð.

Tað ræður snøgt sagt um at gita, hvar bólturin eigur at vera á myndini. Skrivað á lepan, í hvørjum teigi tú heldur bólturin eigur at vera, og send síðani lepan til okkara. Allir lepar við rætta svarinum verða latnir í ein pott, og hin 27. apríl fara vit at kunngera, hvør hepni vinnarin er.  Um so er, at hesin longu hevur keypt sær ferðaseðil til dystin, ber sjálvandi til at fáa hendan endurgoldnan. Kappingin verður í blaðnum til og við 23. apríl. Minnist til. Jú fleiri lepar tit senda inn, størri er møguleikin fyri at gerast hepni vinnarin.

Sosialurin
ATLANTIC AIRWAYS